ÚT AT KOYRA

## Porsche Cayenne



Á Frankfurt Motorshow komandi heyst verður ein Porsche Cayenne, ið er ein SUV, sum verður gjørdur í samstarvi við VW. Bilurin skal hava sportsligar koyrieginleikar, og motorarnir verða frá 230 til 450 HK.

*FDM / Motor*

## Cadillac Vizón



Cadillac Vizón er ein blandingur av einum stationcar og SUV. Bilurin, ið verður á Detroit Motorshow nú í januar, hevur t.d. On Star System, sum via mobiltelefon og satellit vísir, hvønn veg man skal koyra, eins og trygd og service undir koyring.

*Kelda: FDM / Motor*

## Pontiac REV



Pontiac REV er ein heilt nýggjur bilur, sum er teknaður av einum 24 ára gomlum bildesignara. Forlyktirnar fylgja við tá, bilurin vendir, sum á Citroën DS frá 60-árunum.

*Kelda: FDM / Motor*

# Bilurin sum bleiv bygdur á Tunnuvirkinum

*Her er bilurin uttan fyri Tunnuvirkið Yviri við Strond, har sum skrivstovan hjá Strandferðsluni er í dag. Aftan fyri bilin eru húsini hjá Búnaðarfelagnum. Lutirnir vóru av fleiri ymiskum bilum, og kølaragittari er av einum Ford Consul. Myndin er tikin áðrenn bilurin fekk nummarplátur. Inni við húsini, høgrumegin á myndini, stendur ein skootari við nummar Fø218*



BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað eru hóast alt ikki so fáir bilar, sum eru umbygdir í Føroyum. Vanligt hevur verið, at lastbilar eru gjørdir um til bussar, eins og aðrir bilar eru bygdir um til tað endamál, sum teir skuldu brúkast til. Men bilurin, sum varð bygdur á Tunnuvirkinum Yviri við Strond, er eitt kapittul fyri seg í føroyskari bilasøgu.

### Almar Nordhaug

Tað var norðmaðurin Almar Nordhaug, ið kom til Føroya í 50-árunum at hjálpa til við at fáa gongd á Tunnuvirkið hjá Christian Holm Jacobsen Yviri við Strond, sum kom við hugskotinum at byggja bilin. Hann fekk sær hendan bilin sum ítriv, meðan hann var her, og eisini fyri at prógva, at tað bar til at gera bilar í Føroyum.



*Sum at hyggja inn í stýrihúsið á einum flogfari við nógvum kontaktum. Aftan fyri rattið sæst tann eini hátalarin, sum hevur eina kúpu av plexiglasi omaná*

### Bygdur á Tunnuvirkinum

Almar Nordhaug kom ein dagin inn í Tunnuvirkið við einum gomlum Vauxhall bilmotori og stelli, sum hann hevði funnið á einum ruskplássi í Havn. Hetta var sera rúgvusmikið tilfar, sum tók nógv pláss inni á Tunnuvirkinum. Flest allir, sum arbeiddu á Tunnuvirkinum, hjálptu til við at gera bilin eftir vanliga arbeiðstíð. Ein teirra var Schønning Eysturoy. Við tað at bilurin var gjørdur úr jarni, var neyðugt at hava fólk, sum dugdi at sveisa við í arbeiðinum. Ein teirra var Vilmund Olsen, sum arbeiddi hjá Vilhelm Nielsen. Arbeiðið við at gera bilin tók umleið eitt ár, í tíðarskeiðinum 1955-56, og tá bilurin varð liðugur, fekk hann navnið »Du og jegbilurin«, tí hann bert hevði pláss fyri tveimum fólkum.



*Á hesi myndini frá 1956, er bilurin á eystaru bryggju í Havn, har »Dronning Alexandrine« hjá DFDS liggur flaggskrýdd. Sum tað sæst er stórur áhugi fyri bilinum. Við rattið situr Almar Nordhaug, og undir liðini á honum er Sofus Sivertsen, sum um hetta mundið var »motorsagkyndig«*

*Mynd: D.J. Mortensen*

### Bilurin fer til Noregs

Hóast hesin hvíti og reyði bilurin vakti stóran ans í Havnini, tykist ikki sum bløðini hava skriva um hann tá. Bilurin var framman fyri sína tíð, við t.d. bandavspælara við fýra hátalarum. Bilurin tók seg væl út tá hann koyrdi í havnargøtum. Hetta hevur verið ein sannur dreymabilur, við stórum veingjum aftan, sum var móti tá í tíðini. Ikki er lætt at avgera, hvat slag, bilurin hevur verið, tí hann hevði Vauxhall motor og rammu, meðan aðrir lutir vóru av øðrum bilum – til dømis er kølaragittari av einum Ford Consul frá 50-árunum. Bilurin bleiv góðkendur og fekk nummarplátuna Fø 307. Tá Almar Nordhaug fór heim aftur til Noregs, tók hann bilin við sær og koyrdi við honum í fleiri ár.

### Helst farin fyri onki

Tá Schønning Eysturoy eina tíð var á fyritøkuni í Noreg, har Almar Nordhaug arbeiddi, koyrdi hann nógvar túrar við »føroyska« bilinum. Tað seinasta, nakar veit við vissu um bilin er. at hann bleiv brúktur sum framsýningarbilur í einum møblahandli í Oslo, og eftir at handilin var givin, veit ongin nakað um bilin. Føroyski bilurin er allarhelst farin fyri onki, men tíbetur eru nógvar góðar myndir tiknar av bilinum, meðan hann var her.

*Keldur: Dimmalætting / Sosialurin*



ÚT AT KOYRA

Dekkvask frá Kemilux

# – Rein dekk glíða ikki í kava

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

At siga, at rein dekk ikki glíða í kava, er møguliga ov nógv avgjørt, men nakað er hóast alt um tað. Nú kavin hevur ligið, er ofta komið fyri, at bilar við góðum vetrardekkum hava ilt við at klára seg í hálkuni. Ein orsøk kann vera, at dekkini eru ov skitin og treingja til vask.

### Dekkvask

Nógv ár eru nú liðin síðan Dekkvask hjá Kemilux á fyrsta sinni kom á marknaðin einaferð í sjeytiárunum. Tað er nú einaferð soleiðis, at eitt nýtt reint dekk hevur gott tak í kavanum, men við tað at vegirnir eru skitnir, verður mynstrið í kavadekkinum dálkað av olju og øðrum feittevnum. Hetta hevur við sær, at dekkið missir vegtakið í kavanum, og er ikki nærtil so gott sum tað annars kundu verið. Tá Dekkvask verður sproytað á dekkini, skal tað helst vaskast av aftur við heitum vatni, ella koyra bilin gjøgnum kavan og reinsa tey á tann hátt. Sporini í kavanum verða svørt av olju og aðrari dálking, ið rennur úr dekkunum. Hetta vísir, hvussu skitin dekkini eru. Eftir vaskingina verður bilurin heilt øðrvísi at koyra, og klárar seg nógv betur í kavanum.

### Dekkvask á "Jyllands-Ringen"

Einaferð í áttatiárunum stóð at lesa í Motor, limabladnum hjá FDM, at teir høvdu roynt Dekkvask hjá Kemilux á teirra koyriteknisku breyt, »Jyllands-Ringinum«, og komu til ta niðurstøðu, at tað var lívshættisligt at brúka. Sannleikin var, at teir høvdu royndarkoyrt dekkini undir skeivum fortreytum, við tað at teir sprændu Dekkvask á dekkini, og fóru síðan á prøvabanan við nógvum vatni. Hetta var sjálvandi ikki tað, Dekkvask var ætlað til, og bleiv skrivingin harðliga átalað úr Føroyum. Eftir at teir hjá FDM vóru betur kunnaðir um, hvat evnið var gjørt til, komu teir seinni við eini umbering.

### Vegleiðing frá Kemilux

Á vegleiðingini á Dekkvask dunkunum stendur, at Dekkvask er ein góð hjálp í kava og minkar um vandan fyri at bilurin glíður í kavanum. Dekkvask skal sproytast á dekkið og síðan skolast av aftur við heitum vatni, ella koyra varliga aftur og fram í kavanum fyri at fáa Dekkvaskið av aftur. Viðgerðin kann endurtakast, um tað er neyðugt. Eisini ráða Kemilux til at koyra varliga teir fyrstu 50 til 100 metrarnar, tí bilurin kann glíða, áðrenn dekkini eru heilt rein. Kemilux framleiðir eisini onnur evnir til bilar, so sum H 79 avfeitningsevni, Bilrútavask (sprinklaraveska), Bil Sjampoo, rustloysara o.a.



*Johan Eysturoy hevur verið stjóri á Kemilux síðan 1986*



*Schønning Eysturoy (1918-1996) var við til at stovna Kemilux í 1965. Fyrsta sápan varð blandað í einum fýrrúmi í Vaktarhúsbrekku í Havn. Fyrstu árini vóru tað Schønning og konan, Ingibjørg, sum blandaðu sápuna. Schønning bar so ta lidnu sápuna út til handlar og virkir, fyrst á herðunum, so við súkklu og síðan við hýruvogni. Eftir fáum árum blivu so ráð til ein Morris Mini til flutningin*

### Stovnað í 1965

Eftir at ein av stovnarunum av Kemilux, Schønning Eysturoy, hevði arbeitt á Tunnuvirkinum í Havn í mong ár, sást fyrst í sekstiárunum, at eftirspurningurin eftir sildatunnum var fallandi. Hetta hevði við sær, at Schønning fór at leita sær eftir øðrum arbeiði, og tá ein donsk fyritøka í bløðunum søkti eftir einum føroyskum umboðssølumanni í Føroyum, bleiv ein umsókn send sambært hesi lýsing.

Tað vísti seg, at danska fyritøkan sendi umsóknina beinleiðis til HG Gip Chemical AB í Svøríki, ið gav Schønning loyvi til at framleiða tann vaskievnir í Føroyum. Í 1965 stovnaðu Schønning Eysturoy, Guttorm Djurhuus, Absalon Eysturoy og Henning Eysturoy sápuvirkið Kemilux. Fyrsta sápan varð blandað í einum lítlum fýrrúmi í Vaktarhúsbrekku í Havn. Í sjeytiárunum tóku Absalon og Henning Eysturoy seg úr fyritøkuni, og Schønning og konan, Ingibjørg, saman við Guttorm Djurhuus hildu fram við Kemilux. Í 1978 flutti fyritøkan í nýggj hølir á Oyri, og var har í 11 ár, til teir í 1989 fluttu í stóra virkisbygningin í Mykinesgøtu í Havn.

### Umboðað í fleiri londum

Næstan helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings, og fyritøkan er umboðað í fleiri londum, sum til dømis í Danmark, Noreg, Grønlandi, Íslandi, Skotlandi og Kanada, eins og Kemilux reinsievnir hava verið brúkt eftir fleiri størri oljudálkingar í Føroyum og uttanlands. Síðan 1986 hevur Jóhan Eysturoy verið stjóri á Kemilux, ella Kemilux Industri, sum fyritøkan eitur í dag.




*Um størri bilar sum bussar og lastbilar høvdu eina innbygda skipan, sum kundi sproyta Dekkvask á dekkini, tá teir høvdu trupulleikar í kavakoyring, hevði í mongum førum ikki verið neyðugt við kavaketum*




*Ein av fyrstu Dekkvask lýsingunum frá sjeytiárunum*




*Sølustjórin á Kemilux Industri, Heidi Petersen, vísir her hvussu Dekkvask skal nýtast*